# Skulu fóta sær í London

Menningarstovan skipar í komandi viku fyri tiltaki í London.

Tiltakið er serliga ætlað skapandi partinum av vinnuni, og fevnir hetta um bæði ráðstevnu og vitjanir. Hartil verður eisini skipað fyri einum PR-tiltaki, har innboðin fólk úr bretsku vinnuni kunnu uppliva føroyskan tónleik og sniðgeving. Tiltakið er fyrst og fremst ætlað teimum, sum vilja taka seg fram á útlendskum marknaðum, og kunnu áhugað lesa meira um tiltakið á www.trade.fo/funky

# Nógv fleiri lønarkrónur



Fyrstu átta mánaðirnar í ár øktust lønarútgjaldingarnar í Føroyum við sløkum 7 prosentum. Í tíðarskeiðinum frá januar til august í 2005 vóru samlaðu lønarútgjaldingarnar 3.889 mió kr. Sama tíðarskeið í ár vóru lønarútgjaldingarnar 4.156 mió kr. Í alt ein vøkstur upp á 266 mió kr. Størsti vøksturin var í privatu tænastuvinnuni, har lønarútgjaldingarnar øktur við 101 mió kr.



*mynd: Símun Jóannesarson*

# Sunnur vøkstur

| P/F Sansir | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl (tkr.)** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
| Bruttovinningur | 3.617 | 4.214 | 4.475 | 5.549 |
| Ársúrslit | 467 | 406 | 231 | -639 |
| | | | | |
| Ogn í umferð | 3.764 | 3.444 | 3.753 | 5.638 |
| Stuttfreistað skuld | 3.660 | 3.036 | 2.839 | 2.407 |
| | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Gjaldførislutfall | 103 | 113 | 132 | 234 |
| Starvsfólkatal | 8 | 8 | 11 | 17 |
| | | | | |
| **P/F Tinghúsvegur** | | | | |
| **Høvuðstøl (tkr.)** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
| Støðisogn | 3.099 | 3.342 | 2.278 | 74 |
| Eginogn | 2.157 | 2.588 | 2.958 | 4.895 |
| Langfreistað skuld | 1.727 | 1.745 | 1.644 | 0 |
| | | | | |
| **Fíggjarjavnvág** | 4.459 | 4.604 | 4.787 | 5.129 |
| | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Ognaravkast | 4 | 4 | 4 | 47 |
| Eginpeningsavkast | 32 | 26 | 15 | 53 |
| Soliditetur | 48 | 56 | 62 | 95 |

Hóast áhaldandi vøkstur, er Sansir framvegis ein væl konsolidera fyritøka við góðum gjaldsevni.

Tað er greiði boðskapurin, sum roknskapirnir hjá ávíkavist P/F Sansir og P/F Tinghúsvegur 47 (móðurfelagið) gevur lesaranum. Fyri 2005 eru tølini ávirkað av, at ognin við Tinghúsvegin er seld, og at virksemið síðani varð flutt yvir í leigað hølí við Dvørgastíggj. Hetta gevur eitt ógvusligt lop í lyklatølunum fyri fyritøkuna, men eisini uttan hetta hava tølini ein penan boðskap at bera. Ikki minst á gjaldførissíðuni, sum ofta kann verða ein trupulleiki, tá fyritøkur uppliva stóran vøkstur í lutfalsliga stutta tíð.

Tað er tó vert at bíta merki í, at roknskapurin hjá Sansum sjálvum gav hall í 2005. Størsta einstaka orsøkin til hetta var, at nýttu roknskaparreglurnar millum annað viðføra, at menningarkostnaðir – serstakliga av heimasíðuskipanini – verða útreiðsluførdir. Vórðu hesir ognarførdir, vildi tað givið eina aðra mynd av roknskapinum. Samlaða roknskaparúrslitið fyri konsernina varð tó positivt, tí roknskaparligur vinningur var við søluni av ognini við Tinghúsvegin.

Umframt Høgna Rasmussen, stjóra og stovnara, eiga starvsfólk eisini part í fyritøkuni. Við árslok 2005 stóðu Høgni Rasmussen, Bogi K. Henriksen og Eyðna Simonsen uppførd á yvirlitinum yvir partaeigarar, sum hava meira enn 5% av atkvøðurættinum í felagnum ella sum eiga meira enn 5% av áljóðandi partapeninginum.

**-mørk**

# Tveir stjórar

Ætlanin er, at deildin í Danmark í august komandi ár fer at telja eini 6-8 starvsfólk. Tá vera 30 fermetra hølini á Vodroffsvej eisini væntandi skift út við 180 fermetrar á Toldbodgade.

Høgni Rasmussen er í løtuni mest í Danmark, har hann tekur sær av uppbyggingini av donsku deildini saman við Catrine Lippert.

Hetta hevur havt við sær, at arbeiðið í Føroyum er umskipað eitt sindur, soleiðis at Lena L. Mohr nú er vorðin javnsettur stjóri við Høgni Rasmussen. Høgni sigur tó, at uppbýtið í millum tey, ikki er so knívskorið, at hon tekur sær av Sansum í Føroyum og hann sær av Sansum í Danmark. Heldur eru tey felags um nógvar avgerðir og supplera hvør annan.

Hetta verður staðfest í nærum somu løtu. Tí telefonin ringir, og vit mugu avbróta samrøðuna, meðan Høgni tekur sær av onkrum átrokandi máli í Føroyum.

Tivoli. Tá høvdu Sansir 100 gestir til framløgu av nýggju CMS heimasíðuskipanini hjá fyritøkuni Sansir. net. Á samkomuni vóru innboðin fólk, ið starvast við kunning av ymiskum slag. Hetta vóru fólk úr netverkinum hjá donsku starvsfólkunum, vinfólk og onnur, umframt fyritøkur við tilknýti til Føroyar og føroyingar í vinnuni, ið Sansir hevði leitað upp.

Ætlanin er, at hesi fólk, skulu leggja grund undir netverkinum hjá Sansum í Danmark, og so skulu bera tíðindini um Sansir víðari til onnur viðkomandi fólk, og hetta skal spjaða navnið hjá Sansum út til møguligir viðskiftafólk. Hetta kallast vanliga networking og er víðagitið sum sera effektivur og marknaðarføringsháttur. Høgni sigur, at um føroyingar í Danmark eru áhugaðir í at luttaka í hesum netverki, ella vilja frætta meira um virksemið hjá Sansum ella heimasíðuskipanina, so eru tey vælkomin at seta seg í samband við Sansir.

Ætlanin er at skapa upplivingar fyri hesi fólk. Her hugsar Høgni m.a. um viðkomandi fyrilestrar og annað, ið ger tað áhugavert hjá fólkinum at luttaka í netverkinum. Hetta er arbeiðið við sera longum perspektivi, og tí er ikki alneyðugt, at fyritøkan beinanvegin byrjar at fáa viðskiftafólk í Danmark. Men at hesi koma við tíðini.



*Cathrine Lippert greiddi frá um sansir.net nýggju CMS heimasíðuskipanini hjá Sansum*

*mynd: Sansir*

# Heimasíðuskipanin er ísbrótarin

Sansir í Danmark veitir allar tær somu tænasturnar, sum Sansir ger í Føroyum. Men ætlanin er at brúka heimasíðuskipanina Sansir. net, sum ísbrótara fyri at koma inn á danska marknaðin.

– Vit eru sera væl nøgd við nýggju heimasíðuskipanina. Skal eg sjálvur meta um tað, so haldi eg, at hon er meira brúkaravinarlig enn kappingarneytarnar á danska marknaðinum, sigur Høgni.

– Motivatiónin fyri at gera skipanina og fyri at royna at koma inn á danska marknaðin við henni er, at vit kunnu gera tað betur enn tað, sum er í løtuni. Um man ikki heldur tað, kann man líka so væl lata vera sigur Høgni og vísir á:

– Afturmeldingarnar, ið vit fingu á Bryggjuni vóru eisini, at hetta var ein ótrúliga brúkaravinarlig skipan. Eisini vóru fleiri, ið søgdu, at hesa skipan vildu tey hava, men enn er einki konkret komið burturúr hesum.

**Byggir á drúgvar royndir**

Nýggja CMS heimasíðuskipanin Sansir.net er bygd á gomlu heimasíðuskipanina hjá Sansum. Tey hava arbeitt í fleiri ár við at menna hesa nýggju útgávuna. Eins og í fyrru skipanini er tað brúkaravinarligheitin, ið er í hásæti. Men í nýggju skipanini hevur Sansir roynt at tikið hædd fyri teimum manglum, ið gamla skipanin hevði. Hon er bygd á tær royndir, ið Sansir hevur gjørt við nógvu heimasíðunum, ið fyritøkan hevur gjørt á føroyska marknaðinum.

– Í løtuni hava vit 10 fólk, ið starvast við heimasíðum, so hetta er stórur partur av okkara virksemi, sigur Høgni.

Sansir veitir heimasíðuskipanir, -ráðgeving og -sniðgeving til nógv ymisk virki, stovnar og felagsskapir umframt privatfólk og politikarar. Í Føroyum hevur Sansir verið sera tætt við viðskiftafólkið, og hetta hevur givið nógvar afturmeldingar, ið hava havt stóran týdning í menningini av nýggju skipanini.

**-nud**